

Barnaløg á bandi

»Her eru vit aftur« eitur nýggja barnabandið hjá Johannusi á Rógvu Joensen. Hann hevur gjørt øll 16 løgini á bandinum og orðini eiga Alexandur Kristiansen, Hans A. Djurhuus og Oskar Hermannsson.

Heili 17 fólk syngja á bandinum, bæði børn og vaksin og tónleikararnir eru 14 í tali, føroyingar og útlendingar.

Upptøkurnar eru gjørdar í tíðini 1. juni — 1. november 1985. Eitt hefti við tekstunum og upplýsingum um, hvør syngur og hvør spælir hvørt lagið hoyrir til bandið. Nakrar tekningar eru eisini í heftinum.

Plátubarrin gevur út »Her eru vit aftur«. Bandið kostar 120 kr.

Fyrsta barnabandið hjá Jóhannusi á Rógvu Joensen eitur »Her eru vit«. Tey løgini fáast nú eisini á plátu.



Raddir:
Leivur Joensen, Ingi Ørvarodd, Laura M. Terkelsen, Sólrun Onghamar, Bergitta Hansen, Siri Kunoy, Rannvá Rasmussen, Torunn Hansen, Rannvá Joensen, Elsmaria Wolles, Hugin Janusarson, Hanus Johansen, Ronnie Nielsen, Johanna Johansen, Karl Martin Samuelsen, Malan Thomsen, Oli Poulsen.

Saxofonir: Holger Laumann.

Floyta: Bjørn Sunnersiltarn.

Guitarar:
Óluvur Øster, J. á R. Joensen, Ole Fick, Hildebartur Hansen, Flemming Ostermann.

Keyboard:
Oli Poulsen, Sunleif Rasmussen, Finnur Hansen, Holger Laumann.

Bass: J. á R. Joensen, Jens Tummas Nolsø.

Trummur/Slagtól:
Hermund Jacobsen, Ronnie Nielsen, Fríði Olsen, Birger »Kralle« Sulsbruck, Hans Hall.

Orð:
Sólrin, Anna systir, Yggstur umboð, Ein lítil kransi fólu, Per sum býr í Hornabø, Eg kenni mína gentu, Mánadagis Mortan, Alexandur Kristiansen.

Eg elski mær, Lítil drongur, Heygsmaður, Smásamoð, Har skinur sól, Tú skalt tosa, Lítli beiggi, Mosi, Hans Andreas Djurhuus.

Frisa og Klovn, Óskar Hermannsson.

Løg: Johannus á Rógvu Joensen.

Upptøkurnar eru tarmar frá tíðarskeiðinum 1. juni til 1. november 1985 í LT Studio (upptøka og mix - tekniskari: J. á R. Joensen) og í Easy Sound Studio (Mix og upptøka - tekniskari: Niels Erik Otto).

Tøkk til Jens Christian Skaalum, Mikkjal Joensen, Simme Musikkhus, foreldur og avvarðandi, ið aftur einaferð hava stuðlað so dygdigliga, og ti verð við til at gjørt hetta tiltak møguligt. Eisini vilja vit senda eina tøkk til Nólsoyar, fyri at vit enn einaferð fingu loyvi til at nýta orð Hans Andreasar.

Prent: Estra, Gotu.



Ingi Joensen hevur gjørt permuna. Heitið á bókini og permumyndin eru úr søguni Ein skaldsøga um frá A

BARNAJÓL Nú í bókabúðunum

Barnajól, sum er seinasta nummarið av Barnablaðnum í hesum ári, er útkomið.

Tey, sum halda Barnablaðið, fáa tað sjálvandi sendandi við postinum, ella eisini verður tað býtt út í skúlunum. Hini, sum ikki halda Barnablaðið, kunnu nú keypa Barnajól í bókabúðunum.

Í Barnajólum er hópur av áhugaverdum tilfari. Ymist jólaitriv, søgur, teknisøgur, gátur og spøl. Og so sjálvandi ikki at gloyma Gaman.

Eisini ber til at lesa um, hvussu tey hildu jól í gamlari tíð, og í stuttari grein verður sagt frá, hvørjar nýggjar barnabøkur eru at fáa nú upp undir jól.

Ein teigur í Barnajólum eitur NÚ...OG TÁ. Í hesum teigi standa aktuel tíðindi, og so verður eisini sagt frá hendingum, sum fóru fram fyri tiggju árum síðani.

Sum nakað serligt, so fylgir eitt spæl við hesum Barnajólum. Eitt Føroyaspæl kunnu vit næstan rópa tað.

Teknarin Regin Debess, sum er við í blaðstjórnini á Barnablaðnum, hevur teknað hetta spennandi og áhugaverda spælið, og hann kallar tað: **Úr Suðuroy til Fugloyar.**

Onkrum rennur helst í huga bragdið, sum Sigurð Lamhauge framdi á sinni. Og í hesum spælinum kunnu tú og eg endurtaka ferðina hjá honum. Hjá okkum verður ferðin helst ikki so strævin, tað vóna vit ið hvussu er ikki.

Í blaðstjórnini á Barnablaðnum sita annars Niels Jákup Thomsen, blaðstjóri, og Erhard Jacobsen.

Og blaðstjórnin gleðir seg til at fara undir at gera Barnablaðið fyri 1987.

Barnajól er sum nevnt komið í bókabúðirnar, har tað fæst fyri 15 kr.

Annars ber til at tekna seg sum haldara av Barnablaðnum á **Bókamiðsøluni, Tinghúsvegur, 100 Tórshavn** (Tlf. 1 37 56).



Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bók ætlað undirvísingini í kunning/søgu í 3.—5. flokki.

Bókin er eftir danan Peer Svenstrup og ber heitið »Ferðin um havið — á rannsóknarferð við Columbusi«. Niels Nattestad hevur umsett. Teknað hevur Orla Klausen.

Bókin, ið er 54 síður, er skrýdd við nógvum tekningum, ið leggja upp til prát millum næmingar og lærara um evnið í bókini.

Hetta er ikki søgubók í orðsins týdningi. Størsti parturin leggur upp til, at næmingarnir sjálvir ella saman við lærararanum lesa bókina sum spennandi lesnað í skaldsøgustili. Aftast í bókini eru neyvari søguligar viðmerkingar, ið stuðla uppundir fatanina av tí lisna.

Sum vanligur stuttleikalesnaður hjá børnum í 10—14 ára aldri er bókin eisini væl hóskandi.

»Ferðin um havið« kostar 84,- kr. innbundin.

Hin besta gávan



Hin besta gávan

Um bókina **Hin besta gávan** sigur Jákup í Skemmuni:

»Henda bókin er umsett við slíkum tokka til evnið, til málið, at úrslitið er ein yndisligur ljómleikur, sum líðandi tekur teg við sær fram til ta vøggu, har friðarkongurin lá.«

DROPIN

Ymiskt frá Jens Paula

22. bókin hjá Jens Paula Heinesen er komin. Hon eitur »Tann gátuføri kærleikin«. Hetta eru stuttsøgur, ritroyndir (essays) og hugleiðingar, níggju í tali. Bókin er í trimum pørtum. Ein yrking er eisini. Hon eitur Yrkingin talar við skald sítt.

Jens Pauli skrivar um Hans A. Djurhuus á 100 ára degnum í 1983. Høvundurin hevur ferðast í Europa og í nýggju bókini skrivar hann um ferðir í Jugoslavia, Albania og Spania. Hesar ferðafrásagnir eru tríði parturin í bókini og kallast Á søgunnar bráðpannu, Ein glampandi glæstribók og Á hesperisku strondini.

»Tann gátuføri kærleikin« er 160 síður og hon kostar 160 kr. heft. Útgevari er Forlagið Hestur á Tvøroyri.

Innstillaður

Jens Pauli Heinesen hevur skrivað og givið út bøkur í yvir 30 ár. Tann fyrsta, »Degningsælið«, kom í 1953.

Nú hevur Rithøvundafelagið innstillað skaldsøgu hansara »Leikur tin er sum hin lósi dagur« (1982) til Bókmentaheiðursløn Norðurlanda ráðsins. Inge Knutsson hevur umsett bókina til svenskt til dómsnevndina at lesa.

»Leikur tin . . . « er triðja bókin í røðini Á ferð inn í eina óendaliga søgu. Tvær aðrar eru komnar síðani 1982, men nevndin, Rithøvundafelagið hevur sett at gera innstillingina, hevur mett, at »Leikur tin . . . « er betri enn tær. Ikki er loyvt at innstilla bøkur, sum eru eldri enn fýra ár.

Avgjørt verður á fundi í Stockholm tann 20. januar, hvør skal hava heiðurin og tær 125.000 kr.

hd

Filmsfelagið

— er óheft áhugafelag fyri øll filmshugaði. Sýningar felagsins eru annanhvønn sunnudag kl. 16.00 í Sjónleikarhúsinum.

Filmsfelagið avgreiðir flest allar spurningar viðvíkjandi filmi. Tænastan er almenn og ókeypis á tlf. 11182 eftir vanliga arbeiðstíð, ella um postadr. postboks 2118, Tórshavn.

(Skuldi onkur havt áhuga, er vitjanaradr. Fútalág 43, Tórshavn).